ÚT AT KOYRA

## IMZA í Turkalandi



Kendi danski bilasølumaðurin, Nic. Christiansen, hevur gjørt eina innflutningsavtalu við turkiska vinnufelagið IMZA, sum júst nú ger eina nýggja bilverksmiðju, um at selja teirra bilar, ið koma á marknaðin um tvey ár.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mondus 2



Hybridbilurin Mondus 2 er ein prototypa frá Renault, sum er ein kombineraður persón- og vørubilur, við 4 setrum og motorinum framman.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Renault Operandi



Operandi er eisini ein prototypa frá Renault við hybridtøkni. Hóast motorurin er aftan, er hann ein rúmligur vørubilur.

*Kelda: Motor Magasinet*

# FDM afturvísur átalu frá donskum bilainnflytarum

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Danskir bilainnflytarar hava í einum tíðindaskrivi hvassliga átalað, at FDM í seinasta nummari av limablaðnum Motor hevur funnist at rustverjuni á fleiri nýggjum bilmodellum.

### Munur á kvalitetinum

FDM limablaðið Motor hevur saman við svenska bilblaðnum Vi Bilägare, kannað, hvussu 97 ymisk bilmodell vóru rustviðgjørd. Kanningin, ið varð gjørd av nýggjum bilum frá 1998 til 2000, vísti, at stórur munur er á kvalitetinum. Nakrir bilar eru konstrueraðir soleiðis, at teir mangla neyðuga rustverju í fleiri holrúmum. Hetta kann føra til, at bilarnir fara at rusta seinni.



*Bilarnir mugu verða rustviðgjørdir til at standa seg ímóti veðurlagnum í Danmark og Norðurlondum sum heild*

### Nordisk Antirustkodex

Hóast galvaniseraðar stálplátur eru betur vardar móti rusti enn vanligar stálplátur, vísa kanningar at pláturnar skulu verða konstrueraðar rætt og fáa neyðuga rustverju. Eisini hevur tað stóran týdning, at undirvognurin verður hildin reinur, eins og skermkassarnir og bilurin sum heild. Deildarleiðarin á teknisku deild hjá FDM, Jørgen Jørgensen, hevur í fleiri ár víst á, at ikki allir nýggir bilar eru nóg væl vardir móti rusti. Hann er annar av umboðsmonnunum hjá FDM í felags norðurlendska samarbeiðinum "Nordisk Antirustkodex 2000 for personbiler", sum arbeiðir við at fáa bilverksmiðjurnar at taka rustrupulleikan í álvara.

### Broyta mannagongdina

Ymiskt er, hvussu langt áramál bilverksmiðjurnar lýsa við, men tær flestu geva millum 6 og 10 ára garanti móti gjøgnumtering. Hóast mótstøðu frá "De Danske Bilimportører", heldur FDM fast við sína niðurstøðu, og krevur, at tær bilverksmiðjur sum ikki rustviðgera sínar bilar nóg væl, broyta mannagongdina í framleiðsluni soleiðis, at bilarnir framyvir verða rustviðgjørdir til at standa seg ímóti veðurlagnum í Danmark og Norðurlondum sum heild.

*Kelda: Tíðindaskriv frá FDM*

# BMW til alla familjuna

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

BMW bilverksmiðjan arbeiðir í løtuni við einum rúmligum familjubili, ið verður bygdur yvir BMW-500 plattformin.

### Vaksandi áhugi

BMW hevur í longri tíð havt ætlanir um ein rúmligan familjubil. Áður eru gjørdar tvær prototypur, sum ikki blivu til nakað av teirri orsøk, at teir fóru at verða ov dýrir.

Marknaðurin í Evropa er hesi seinnu árini broyttur, soleiðis at áhugin fyri hesum bilum nógv vaksin, hóast teir eru dýrir at keypa.

### Prototypa er gjørd

Nú hava teir so aftur gjørt eina prototypu, sum teir hava koyrandi inni á BMW verksmiðjuni, hesin bilurin er 1,74 m høgur, og sær út sum ein rættur BMW í MPV stýli. Bilurin er bygdur yvir ein BMW-500 plattform, ið trekkjur á bakhjólunum ella á øllum fýra hjólunum, eins og pláss er til ein V8 motor.

*Kelda: FDM / Motor*






ÚT AT KOYRA

# Freelander
## – nú við BMW turbodiesel motori




*Freelander fæst nú við BMW turbodiselmotori og Common-rail innsprænging*



**Land Rover Freelander er nummar eitt á listanum yvir teir best umtóktu 4- hjólstrekkjarnar í Evropa, og nummar fýra í øllum heiminum. Bilurin hevur nú ein BMW turbodiesel motor við common rail innsprænging. Eisini er bilurin heilgalvaniseraður, eins og hann hevur fingið nýggjan gearkassa.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

### Nógvar broytingar

At síggja til er hesin nýggjasti Freelander lítið broyttur, men tann sum fer ein royndartúr við bilinum, verður skjótt varðugur við at her eru fleiri broytingar til tað betra. Millum 40 og 70 prosent av lutunum í bilinum eru antin nýggir ella broyttir. Uttan at fara í smálutir merkist, at undirvognurin er annarleiðis og bilurin er betur at koyra við. Freelander hevur góðar koyrieginleikar á vanligum koyrivegi, og off-road eginleikarnir eru framúr góðir.

### Framkomin útgerð

Freeelander hevur alt, ið hoyrir til ein off-roadara, sum til dømis ABS bremsur, ETC (Elektronic Traction Control), sum deilir kraftina til tað hjólið, ið hevur best vegtak, og HDC (Hill Descent Control), sum ger tað lættari og meira trygt at koyra í undanbrekku, eitt nú í haganum. Sum nakað nýtt fæst Freelander við einum framkomnum automat-gearkassa, har til ber at skifta millum "drivemode", "sportmode" og til Steptronic, har man skiftir gear manuelt. Hesin gearkassin er standard útgerð til V6 motorin og fæst sum eykaútgerð til dieselmotorin.

### BMW dieselmotor

Ein onnur broyting er, at nú eru tveir nýggir motorar á skránni. Annar er ein 2,5 litrar V6 við 177 hk, hin ein 2,0 litrar BMW turbodiesel motorur við common-rail innsprænging og 112 hk, sum er ein væl royndur og orkusparandi motorur. Innan virkar Freelander sera tiltalandi við ljósum litum. Instrumentini eru løtt at yvirskoða, kontaktir og knøttar sita har teir skulu. Eisini á baksetrunum er gott pláss. Um baksetrið verður lagt niður, verður viðførisrúmið heilar 1320 litrar. Freelander kann draga ein 2 tons trailara.



*Innan er Freelander sera tiltalandi við ljósum litum*

### Land Rover Freelander 2.0 TDI

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 2.0 litur diesel 112 hk v/ turbo og common rail innsprænging |
| 0-100 km/t | 13,0 sek. |
| Oljunýtsla | 13,2 km/l |
| Dekkstødd | 195/80-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 438,2 cm |
| Breidd | 180,5 cm |
| Hædd | 175,7 cm |
| Eginvekt | 1550 kg |
| Totalvekt | 2075 kg |
| Prísur | kr. 269.000,- sum vøruvognur |
| Søluumboð | P/F D.B. Bilar<br>Jónas Broncksgøta 15<br>FO-100 Tórshavn<br>Tlf. 310600 |